## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og sirm, seinnapartin minni vindur og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og um morgunin eitt skifti regn annars sólglottar. Um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind og ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Nú kemur Vencil nummar 7

TÍÐINDASKRIV

Hvat hava James Joyce, Tove Ditlevsen, Malan Poulsen og Jóanes Nielsen í felag? Jú, saman við einari ørgrynnu av øðrum høvundum, eru tey skrivandi í føroyska skaldskapartíðarritinum Vencili nummar 7, ið fær lív fríggjakvøldið 25. september kl. 20. Hetta verður á móttøku á grafiska verkstaðnum Steinprent á Skálatrøð í Havn.

Á móttøkuni verður upplestur og sangur. Tey sum lesa upp verða Katrin Reinert, Bárður Persson, Malan Poulsen, Vagnur Streymoy og Oddfríður M. Rasmussen. Tónarnar eiga tenorurin Petur Niclasen og gittarleikarin Ólavur Jacobsen.

Teir báðir menninir handan Vencil, Arnbjørn Ó. Dalsgarð og Oddfríður M. Rasmussen siga, at Vencil hesaferð er stúgvandi fullur av góðum tilfari frá góðum - bæði royndum og minni royndum - høvundum. Millum týddu tekstirnar finna vit tekstir eftir víðagitnar høvundar sum James Joyce, Tove Ditlevsen og Joseph Brodsky. Og teir føroysku eru hesaferð enn fleiri í tali enn vanligt: Tóroddur Poulsen, Malan Poulsen, Jóanes Nielsen, Katrin Reinert, Rói Patursson, Turid Thomsen, Carl Jóhan Jensen, Oddfríður M. Rasmussen, Tummas Niclái Arge, Bergur R. Moberg, Arnbjørn Ó. Dalsgarð, Alexandur Kristiansen, Agnar Artúvertin, Dávur í Dali, Vagnur Streymoy og Sólrún Michelsen.

Vencil hevur eisini eina virkna heimasíðu, har til ber at lesa um og at hoyra skaldskap verða bornan fram. Eisini ber til at tekna seg sum haldara av skaldskapartíðarritinum á heimasíðuni, sum eitur www.vencil.fo.




## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 24 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 23 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 25 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðdtu nátt:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðimg og brúgvalagið haðani fer um Føroyar í dag – hósdag.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing eystan og hitabrúgvin við Føroyar fer skjótt í landnyrðing. Kuldabrúgvin sunnan fyri Ísland verður við Føroyar fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/09 kl. 06[00] – 23/09 06[00]. Hitin í gjár: 9,5°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° -
Mesti hiti máldur í september: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 22/09 kl. 06[00] – 23/09 06[00].
Avfallið higartil í september: 82 mm




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

16. september Mánin næstur jørðini
18. september Tendring
26. september Fyrra kvarter
28. september Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. sept | 11:36 | - | 10:36 | 23:02 | 10:51 | 23:17 | 01:10 | 13:36 | 02:10 | 14:36 | 09:51 | 22:17 | 08:51 | 21:17 | 11:51 | - | 00:25 | 12:51 | 11:21 | 23:47 | 00:10 | 12:36 |
| 25. sept | 00:02 | 12:27 | 11:27 | 23:53 | 11:42 | - | 02:02 | 14:27 | 03:02 | 15:27 | 10:42 | 23:08 | 09:42 | 22:08 | 00:17 | 12:42 | 01:17 | 13:42 | - | 12:12 | 01:02 | 13:27 |
| 26. sept | 00:53 | 13:31 | - | 12:31 | 00:08 | 12:46 | 02:53 | 15:31 | 03:53 | 16:31 | 11:46 | - | 10:46 | 23:24 | 01:08 | 13:46 | 02:08 | 14:46 | 00:38 | 13:16 | 01:53 | 14:31 |
| 27. sept | 02:09 | 14:46 | 01:09 | 13:46 | 01:24 | 14:01 | 04:09 | 16:46 | 05:09 | 17:46 | 00:24 | 13:01 | - | 12:01 | 02:24 | 15:01 | 03:24 | 16:01 | 01:54 | 14:31 | 03:09 | 15:46 |
| 28. sept | 03:23 | 15:45 | 02:23 | 14:45 | 02:38 | 15:00 | 05:23 | 17:45 | 06:23 | 18:45 | 01:38 | 14:00 | 00:38 | 13:00 | 03:38 | 16:00 | 04:38 | 17:00 | 03:08 | 15:30 | 04:23 | 16:45 |